Heilsufrøðiliga Starvsstovan

Falkavegur 6, 2. hædd
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 35 64 00
Fax. +298 35 64 01
E-mail: hfs@hfs.fo
www.hfs.fo

FOOD, VETERINARY AND ENVIROMENTAL AGENCY

# Hjálparfólk

## til marknaðareftirlitsstøð í Vági

Søkt verður eftir tímaløntum hjálparfólki í sambandi við arbeiði á marknaðareftirlitsstøðini fyri fiskaúrdráttir úr 3. londum í Vági, til setan skjótast gjørligt.

Starvið, sum er tilkalling, tá ið tørvur er á at fremja marknaðareftirlit, fevnir um:

- Skjalaeftirlit
- Samleikaeftirlit og
- Eftirlit av sjálvari vørusendingini, m.a. vørukanningar á marknaðareftirlitsstøðini og at senda sýni til kanningarstovuna hjá okkum.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan syrgir fyri neyðugari upplæring.

Aftrat teimum uppgávum, ið hoyra til sjálvt marknaðareftirlitið, kunnu hugsast aðrar møguligar uppgávur fyri Heilsufrøðiligu Starvsstovuna í Suðuroynni, so sum eftirlitsvitjanir o.a.

Best er, um tú hevur lokið prógv sum
- Laborantur ella
- Hægri útbúgving innan fiskivinnu (HIF) ella
- Tilsvarandi útbúgving,

Hevur tú eina miðnámsútbúgving við góðum avriki, er tú eisini vælkomin at søkja.

Royndir við sýnistøku, góðskustýring og EDV á brúkarastøði eru fyrimunir.

Tú skalt hava koyrikort. Somuleiðis skalt tú hava góð samstarvsevni, vera nærlagdur/nærløgd og duga at arbeiða miðvíst og sjálvstøðugt.

Starvið, ið er tímalønt, og sum í fyrstu atløgu bert viðvíkur teimum marknaðareftirlitum, ið skulu gerast, tá ið 3. lands fiskaúrdráttir verða uppskipaðir í Vági, verður tímalønt sambært galdandi sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið, sí heimasíðuna hjá lønardeildini, www.lnd.fo.

Fleiri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Elspu Petersen embætisdjóralækna ella Óluvu Niclasen, deildarleiðara.

Upplýsingar um Heilsufrøðiligu Starvsstovuna annars, eru á okkara heimasíðu, www.hfs.fo.

Umsóknir til starvið, við avriti av prógvum, starvsroyndum og møguligum viðmælum, skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 12/3/2007.

---

# Søkt verður eftir fólki til alingina í Suðuroy

Talan er um 2 fulltíðar størv, at seta skjótast gjørligt. Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um røkt av fiskinum.

Arbeitt verður í eini vaktarskipan, hvar tú, saman við dugnaligum starvsfólkum, fært ábyrgdina av dagligа rakstrinum á tykkara økið.

Vit væntað, at tú ert sera arbeiðssamur, nær lagdur og árvakin í tínum arbeiði, tá hetta eru fremstu eginleikarnir hjá einum góðum alara.

Lønin verður avtalað ímillum leiðslu og umsøkjara.

Um hetta ljóðar áhugavert, ert tú vælkomin at søkja starvið við at senda eina umsókn til.

**P/F Faroe Farming**
Postbox 97
FO-900 Vágur

Ella ringja til Erhard á tlf. 221447 og frætta nærri

---

GRINDAMANNAFELAGIÐ
1993 1584

# Aðalfundur

Aðalfundurin verður í Norðurlandahúsinun leygardagin tann 24. mars 2007 kl. 13:30 við hesi skrá:

1. Frágreiðing frá virki felagsins í farna ári
2. Grannskoðaður roknskapur verður lagdur fram
3. Val av tveimum nevndarlimum
4. Val av grannskoðara
5. Ásetan av limagjaldi
6. Innkomin mál
7. Ymiskt

Gjørt verður vart við, at mál, sum ynskjast viðgjørd sambært pkt. 6, skulu vera nevndini í hendi seinasta lagi 7 dagar fyri aðalfundin.

Aðalfundurin er almennur.

Høvi er altíð hjá áhugaðum at gerast limir.

**Nevndin fyri Grindamannafelagið**
Fútalág 40 - 100 Tórshavn

---

# Barnagarðurin Leikan

Fo-220 Skálavík
Tlf. 36 10 31 fartlf. 26 89 31
Leikan-s@post.olivant.fo

# Avloysari

Fyri starvsfólk í farloyvi, verður søkt eftir avloysara at arbeiða 30 tímar um vikuna í tíðarskeiðinum 5. mars – 20. mai 2007.

Í barnagarðinum, sum er 6 ára gamal og normeraður til 15 børn, eru bæði vøggustovu- og barnagarðsbørn og eisini skúlabørn í frítíðaransingini.

Áhugaðir umsøkjarar ið hava fyrispurningar, eru vælkomnir at seta seg í samband við kommununa, tlf. 21 92 21.

Skrivlig umsókn við møguligum prógvum og viðmælum verður at senda til Skálavíkar kommunu, 220 Skálavík, og skal verða okkum í hendi seinast hósdagin 1. mars 2007 kl. 12.00.

Lønar og setanartreytir sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelagið.

---

# Skrivari til advokatfyritøku

Vit søkja eftir skrivara at starvast niðursetta tíð á skrivstovu okkara skjótast gjørligt. Viðkomandi skal helst hava skrivstovuútbúgving ella hava royndir innan økið. Tað er neyðugt, at viðkomandi er stinnur í føroyskum og donskum, og er tað ein fyrimunur, um viðkomandi dugir væl enskt.

Skrivlig umsókn skal latast skrivstovuni í seinasta lagi 2. mars 2007.

**Advokatfirma Annfinn V. Hansen**
Bryggjubakki 22
Postsmoga 106
110 Tórshavn

tele. (+) 298 359595
fax. (+) 298 359596
t-postur. advokat@advokat.fo

---

Sosialurin
www.sosialurin.fo

---

# Frá S & K felagnum

Aðalfundur felagsins verður í húsinum hjá S & K felagnum, Traðarvegur 20, Tórshavn, leygardagin, 24. februar 2007 kl. 19:00

Dagsskrá sambært lógum felagsins

1. Frásøgn formansins frá farna ári.
2. Roknskapur til góðkenningar.
3. Val av nevndarlimum og tveimum tiltakslimum.
4. Innkomin uppskot.
5. Ymiskt.

S&K

---

TJÓÐVELDISFLOKKURIN

# Floksting 2007

Regluliga Floksting Tjóðveldisfloksins verður í Bygdarhúsinum í Miðvági

fríggjadagin hin 23. mars & leygardagin hin 24 mars 2007

Sí www.tjodveldi.fo

***Tjóðveldisflokkurin***